**Býráðsfundur mikudagin 27. apríl 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen og Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **11/00145**<br>**Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 79 í Syðrugøtu**<br>Poul Arni Jacobsen søkir um byggiloyvi á omanfyri nevnda matrikul.<br><br>Á fundi tann 21.03.2011 mælir tekniska nevnd til at viðgerða málið á fyrst komandi býráðsfundi.<br><br>Á býráðsfundi tann 28.03.2011 varð málið beint aftur til teknisku umsiting.<br><br>Tekniska nevnd hevur á fundi tann 13. apríl 2011 aftur viðgjørt málið, og mælir til at fylgja tilmælinum hjá teknisku umsitingini, um at geva byggiloyvi við ávísum treytum. | Einmælt samtykt at taka málið av skrá. |
| 2. | **11/00201**<br>**Frílendi við viðalund og gróthúsum í Áartungu í Syðrugøtu**<br>Tann 04.04.2011 var fundur og kunning um eina verkætlan fyri økið omanfyri Tungu í Syðrugøtu. Ein bólkur hevur ætlan um at byggja gróthúsini uppaftur, at planta økið, gera sniðgøtur og onkrar brúgvar um áirnar.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at stuðla ætlanini við at støða verður tikin til møguligar umsóknir. | Einmælt samtykt at arbeiða víðari við málinum. |
| 3. | **11/00179**<br>**Umsókn frá Skótalið Leirvíks Párlls – KFUM skótar, um fíggjarligan stuðul**<br>Trivnaðarnevndin hevur samtykt at stuðla við kr. 37.000,00 vísandi til umsókn dagf. 27. mars 2011.<br><br>Upphæddin verður tikin av konto nr. 5.24.14 – 20 “ Stuðul til ítrótt”<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini |

**Býráðsfundur mikudagin 27. apríl 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen og Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

samtyktini hjá trivnaðarnevndini.

**4.** **11/00195**

**Ognarviðuskiftir á matr. nr. 53a Norðragøtu**

Nevndi matrikul er undirlendi, sum standmyndin Tróndur í Gøtu stendur á.

Kunning frá advokatinum liggur í málinum.

Tekniska nevnd mælir til at ognartaka lendi undir standmyndini av Tróndur í Gøtu.

Fíggarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**5.** **10/00313**

**Bussleiðin í Eysturkommunu**

Sambært sáttmálanum við AP-bussar skulu evt. broytingar/tillaðingar á leiðini gerast áðrenn 1. mei. Skal játtanin fyri 2011 røkka, er neyðugt at skerja verandi túratal.

Fundur hevur verið við AP-bussar um møguligar broytingar fyri at lækkað kostnaðin, og AP-bussar hava givið kommununu uppskot um broytingar sum geva eina sparing uppá 205.800,00 kr. árliga.

Fíggjarnevndin samtykti á fundi tann 15. apríl 2011, at arbeiða víðari við málinum, og at endalig støða verður tikin á komandi býráðsfundi.

Einmælt samtykt at arbeiða víðari við málinum.

**6.** **10/00498**

**Umleggjan av 6 røktarheimsplássum á Gøtubrá til sambýlispláss**

Minnilutin í trivnaðarnevndini Hanna Jensen mælir til at umsitingin arbeiðir víðari við eini loysn, sum tó ikki krevur meirútreiðslur fyri Eysturkommunu. Meirlutin Páll Isholm og Tollakur Joensen mæla til at opna plássini sum sambýlispláss, tó treytað av, at kommunan ongantíð fer at rinda fyri meira enn eina náttarvakt.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mikudagin 27. apríl 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Páll Isholm , Terji Lervig, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Fríðgerð Heinesen og Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

Av tí at Almannaráðið hevur avgjørt at niðurleggja røktarheimsplássini á Gøtubrá mælir fíggjarnevndin til umleggja hesi til umlættingarpláss.

**7. 11/00174**
**Broyting av reglugerð til Gøtubrá**

Trivnaðarnevndin mælir til at reglugerðin verður tillagað í tráð við endaligu avgerðina um mál 10/00498.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við broytingaruppskotinum til reglugerð fyri Gøtubrá frá Almannaráðnum.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndina.

**8. 10/00530**
**Bátahylur á Toftanesi**

Støðutakan til innkomin tilboð.

Tilmæli frá bygginevndini fyri bátahylin fyriliggur.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og fíggjarnevndini, at taka av lægsta “***Tilboð B”*** frá J & K Petersen áljóðandi 7.959.835,00 kr. umframt mvg.

*Málið viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Terji Lervig ______________________________

Joen Magnus Rasmussen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Páll Isholm ______________________________

Jan Erlingsson Petersen ______________________________